Uppskot sent til hoyringar. Hoyringarfreistin er 6. januar 2020.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 9. desember 2019 |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | Skrivið her |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um løggilding av serkønum veitarum mótvegis Arbeiðs- og brunaeftirlitinum**

(Løggilding av serkønum veitarum at gera eftirlit við øðrum gassskipanum afturat smærri gassskipanum í húsvognum o.ø., umframt løggilding innan eftirlit við gassinnleggingum)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 123 frá 22. august 2018 um løggilding av serkønum veitarum mótvegis Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, sum broytt við kunngerð nr. 87 frá 20. juni 2019, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Skjal 1 í kunngerð nr. 123 frá 22. august 2018 um løggilding av serkønum veitarum mótvegis Arbeiðs- og brunaeftirlitinum verður broytt sum ásett í skjali 1.

**2.** Skjal 10 í kunngerð nr. 123 frá 22. august 2018 um løggilding av serkønum veitarum mótvegis Arbeiðs- og brunaeftirlitinum verður orðað sum ásett í skjali 2.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, dagfesting

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Skjal 1**

Í skjali 1, Yvirlit yvir skjøl, Skjal 10 verður “smærri gassskipanum til húsvognar o.a.” broytt til: “gassskipanum og gassinnleggingum.“

**Skjal 2**

**“Skjal 10**

**Løggildingarøki nr. 9: Løggilding sum serkønt virki innan eftirlit við gassskipanum og gassinnleggingum**

Eftirlitini skulu í minsta lagi fara fram sambært viðkomandi vegleiðing frá framleiðaranum, umframt møguligum servegleiðingum frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.

*Løggildingar*

Løggilding sum serkønt virki innan eftirlit við gassskipanum og gassinnleggingum kann fevna um allar niðanfyristandandi gassskipanir og gassinnleggingar ella kann avmarkast til ávísar av hesum.

1) Flokkur 1: Smærri gassskipanir til húsvognar o.a.

2) Flokkur 2: Gassskipanir uttan útlufting til húsarhaldsnýtslu

3) Flokkur 3: Stórkøkar (matstovur o.a.)

4) Flokkur 4: Gassmotorar, gassturbinur og líknandi útbúnaður

5) Flokkur 5: Fyribils gassinnleggingar

6) Flokkur 6: Gassinnleggingar til nýtslu í kanningarstovum og undirvísingarhølum

7) Flokkur 7: Skúrvognar, matveitingarvognar o.tíl., ið ikki verður nýtt sum bústaður

*Løggildingartreytir*

1) Virkið skal hava fólk atknýtt við neyðugari vitan, førleikum, útbúgving og royndum við eftirliti við gassskipanum og gassinnleggingum.

2) Virkið skal skjalprógva innlit í bygningshátt og virkishátt á gassskipanum og gassinnleggingum.

3) Virkið skal hava vitan um, hvørjar kanningar og royndir skulu gerast, og skal kunna staðfesta manglar við viðkomandi skipan.

4) Virkið skal ráða yvir neyðugari útgerð.”